# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hanus Jacob Heinesen, Klaksvík**, ættaður úr Kunoy, andaðist í heiminum mánadagin, 69 ára gamal.

**Gunnar Joensen á Kelduni í Sørvági** andaðist í heiminum mánadagin, 57 ára gamal.

Kistan við **Georg Hansen** fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Georg, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka

### Dagurin

26. august. Líradagur. Dagurin verður eisini róptur líramariumessa, men tað hevur ongan kristiligan ella kirkjuligan týdning. Navnið hevur dagurin fingið bara av teimum mongu mariumessunum um heystið.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



*Í ár eru 35 ár síðan Per og Jensia Højgaard tóku við sum bestýrarar á Sjómansheiminum í Havn*

# Góðu árini á Tórshavnar Sjómansheimi

Í tíðarskeiðinum frá 1974-1987 vóru Jensia og Per Højgaard bestýrarar á Sjómansheiminum í Havn.

Vit eru nøkur, sum halda, at tað hevði verið stuttligt, um vit øll, sum gjøgnum árini høvdu Sjómansheimið sum arbeiðspláss, bústað og dagliga gongd í hesum tíðarskeiði, møttust aftur og á ymiskan hátt mintust ta tíðina.

Um hetta hevur tykkara áhuga, so kundu vit hugsað okkum, at vit øll møttust tann 3. oktober í ár. Vónandi hevur hetta kveikt áhugan og vakt minnini, so eisini tit halda, at tað kundi verið stuttligt við einum slíkum hugnakvøldi.

**Tilmelding:**

Marin, tel. 218757
hr-kl@post.olivant.fo

Sonja, tel. 509313
soniam@apotek.fo

Ann, tel. 253233
annmikkelsen@hotmail.com

Eyðfinn
eydfinn.olsen@gmail.com

# Elsebeth Magnussen 60 ár

2. september fyllir systir 60 ár, og vil eg tí á henda hátt ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum.

Foreldur Elsebeth vóru húsmóðir Elsa Holm fødd Larsen av Oyrarbakka og skipari Alfred Holm úr Vági. Elsebeth er gift við Eivindi Magnussen úr Vági, hvørs foreldur, Marin og Hans, bæði vóru úr Fámjin. Elsebeth og Eivind áttu eisini hús í Fámjin og búðu har eitt skifti.

Elsebeth og Eivind vóru fleiri ár í Grønlandi og fingu har vinfólk fyri lívið. Har varð eisini dótturin Annbritt fødd. Sonurin Marner varð føddur, áðrenn tey fóru til Grønlands. Í Grønlandi byrjaði Elsebeth at ganga á læraraskúla, og eisini eina tíð eftir at tey vóru komin til Danmarkar, gekk hon á Vordingborg Seminarium.

Burturi gott, men heima best, og tí dróg hugurin tey heim aftur á klettarnar, og her gjørdi Elsebeth seg lidnan við sín lesnaða til lærara á Føroya Læraraskúla í 1977.

Elsebeth bleiv lærari á Eysturskúlanum í Havn og var har í eitt ár. Síðani varð Elsebeth sett sum lærari í heimbygdini Vági og er har enn. Síðsta ár bleiv hon sett sum varaskúlastjóri við Vágs skúla. Elsebeth hevur verið á ymiskum skeiðum, og í 1990-91 var hon á skeið á Danmarkslæraraháskúla.



Hon hevur eisini útbúgving sum skúlavegleiðari.

Elsebeth er ein virkin og dugnalig kvinna. Tað liggur væl fyri at seyma og ikki minst at binda, so mong ein troyggjan hevur fløvað mangan. Elsebeth er eisini sera virkin innan Brøðrasamkomuna í Vági, bæði hvat viðvíkur at halda sunnudagsskúla og við sínaru vøkru og kláru sangrødd at vera stuðul í sankórinum.

Vit eru 4 systrar og hevur sambandið okkara millum altíð verið sera gott, og tí var tað ein stór gleði fyri meg, at hon kom at búgva her í Vági. Elsta systur okkara Jona býr í Køge og yngsta systurin Majbritt býr á Oyri. Umframt okkum 4 systrar eru 3 brøður, Óli, Julius og Magnus, sum allir búgva í Vági.

Elsebeth og Eivind eiga 4 ommu- og abbabørn. Marner er giftur við Anniku, og eiga tey tvær døtur, onnur eitur Elsebeth eftir ommuni og hin Jonna eftir hinari ommuni. Annbritt er gift kiropraktor Finn Johannesen og eiga tey Samuel og Joennu.

Nú komandi leygardag kl.11 heldur Elsebeth føðingardagin í Stóra Pakkhúsi í Vági, og gleða vit okkum øll til at hátíðarhalda dagin saman við henni.

Góða systur, takk fyri alt og hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum.

**Marna**

# Amariel Norðoy í Focus

Fríggjadagin 28. august kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Amariel Norðoy upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Heitið á framsýningini er: Útróðrarbørn (lívsins sálmar). Tað, at vaksa upp í Klaksvík millum bátar, skip og trolarar, fólk í øllum aldursbólkum har fiskivinnan var grundarlagið, og man sum barn upplivdi, at tað var lívsgrundarlagið, bæði útróðurin og langfarafiskarí.

Amariel sigur, at tá ið hann vaks upp, snúði stórur partur av tilveruni seg heima hjá teimum um dekksbátin "Norðan", og at báturin gjørdist tekin um samanhald. At tú so at siga gróði saman við bátin. Hetta roynir Amariel at lýsa í sínum málningum á ein dramatiskan og lýriskan hátt.

Framsýningin verður opin til 10. september, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Amariel Norðoy hevur framsýning í Galerie Focus frá 28. august til 10. september*

*Mynd: Jens Kristian Vang*